Kommunufelagið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Tórshavn

Dagfesting
16. oktober 2017

Okkara j.nr.
17/0

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. X

**Viðv. Løgtingsmáli nr. Xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan (Skipan av landsroyndum)**

Mentamálaráðið hevur sunnudagin 24. september sent Løgtingsmál nr. Xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan (Skipan av landsroyndum), til hoyringar.

Endamálið við uppskotinum er, at geva landsstýrismanninum í mentamálum heimild til at víkja frá kravinum um at fyriskipa landsroyndir. Orsøkin er, at fleiri tøkniligar avbjóðingar hava verið seinastu tíðina í sambandi við skipanina av landsroyndum.

Kommunufelagið metir ikki, at tøkniligar avbjóðingar kunna metast sum haldgóð grundgeving fyri, at landsstýrismaðurin fær heimildir til at víkja frá kravinum um landsroyndir. Tøkniligar avbjóðingar eru til at loysa. Høvdu orsøkirnar hinvegin verið av námsfrøðiligum slagi, so var støðan møguliga ein onnur. Men í uppskotinum síggjast ongar námsfrøðiligar grundgevingar.

Kommunufelagið mælir hinvegin til, at landsroyndirnar í størri mun enn higartil verða gagnnýttar sum amboð at menna fólkaskúlan. Kommunufelagið metir, at landsroyndir eru eitt sjálvsagt amboð at brúka í skúlahøpi, bæði á einstaklingastigi við atliti at afturboðan frá skúla og lærara til einstaka næmingin og foreldrini, eins og á yvirskipaðum stigi, soleiðis at skúlaleiðsla, skúlastýri og kommunalir skúlamyndugleikar í trúnaði kunnu fáa nærri tilskilað innlit í, hvussu tað gongur í kommunalu fólkaskúlunum. Hetta er ein av neyðugu fyritreytunum fyri, at skúlamyndugleikin á staðnum kann verða ein virkin partur í menning skúlans.

Kommunufelagið hevur ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Vegna

Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**